# Á veg heim við fullari last

**Nýggi rækjutrolarin hjá vágbingum hevur havt góðan fiskiskap og hann hevur longu fingið uppí**

FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*

Ikki kann sigast annað, enn at tað hevur hilnast væl hjá nýggja rækjutrolaranum hjá vágbingum.

Hvannaberg hevur verið til fiskiskap í fimm vikur og er longu á veg heim við fullari last, sum er 240 tons. Hetta er reiðarin, Jákup Olsen í Vági, væl nøgdur við, tí Hvannaberg hevur bara eitt trol, afturímóti nógvum øðrum rækjutrolarum, sum hava tvey.

Teir hava fiskað við Svalbard og fóru at sigla heim á miðdegi sunnudagin.

Rækjurnar verða avreiddar á Oyri, hagar Hvannaberg kemur til arbeiðstíð fríggjamorgunin.

Men tíverri er prísurin á rækjum sera vánaligur. Jákup Olsen sigur, at fyri tað mesta eru tað ídnaðarrækjur, sum Hvannaberg hevur og fyri tær fáa teir ímillum 6,50 krónur og 8 krónur fyri kilo. Eitt sindur av kókaðum rækjum hevur hann eisini og fyri tær eru prísurin væl betri.

Men reiðarin sigur, at prísurin er uppaftur nógv verri í Noregi, har tað næstan ikki slepst av við rækjur.

– So, hóast tað er langt at sigla, loysir tað seg frægast at avreiða í Føroyum. Men so kastar tað eisini eitt sindur av arbeiði av sær og manningin sleppur heim.

Tá ið Hvannaberg hevur avreitt, fer hann aftur til Svalbard at fiska.

Í løtuni eru tað bara Hvannaberg og Kappin, sum fiska við Svalbard. Allir hinir rækjutrolararnir eru á Flemish Cap.

Tað ljóðar sum um tað loysir seg betri at vera á Flemish Cap. Hví er Hvannaberg so ikki eisini har?

–Vit kundu verið farnir yvir á Flemish Cap. Men støðan er tann, at føroyingar eru í vanda fyri at missa fiskidagarnar við Svalbard, tí vit hava brúkt so fáar av teimum. Vit hava longu mist helvtina av fiskidøgunum, vit upprunaliga høvdu við Svalbard, tí tá ið vit ikki hava brúkt teir, ber illa til tvíhalda um, at vit skulu varðveita teir. Tað skerst heldur ikki burtur, at tað var fyrst og fremst fyri at bjarga fiskidøgunum við Svalbard, at fiskimálastýrið gav okkum loyvi at fáa bátin undir føroysk flagg. Og tá ið tað er orsøkin til, at vit fingu fiskiloyvi, hevði tað verið eitt sindur ómoralskt at fari onkra aðra staðni at fiska, hóast vit hava loyvi til tað, sigur sigur Jákup Olsen.

Tað var fyrr í ár, at Jákup Olsen og aðrir keyptu Hvannaberg úr Íslandi fyri 14 milliónir krónur. Bàturin er 22 ára gamal, men í góðum standi og reiðarin sigur, at í høvuðsheitum hevur hann riggað væl. Skipari er sandvíkingurin, Eyðun Johannesen.



*– Hvannaberg úr Vági hevur fingið fulla last og hann er nú á veg heim at avreiða, men prísurin er vánaligur*

# Ætlar at taka einastu vápnini frá okkum

**–Tað er óhugnaligt, at landsstýrismaðurin í vinnumálum ætlar at reisa spurningin um at friða aling og djórahald fyri verkfalli í vissum førum. Tað fer so líðandi at taka verkfalsrættin frá okkum, sigur Ingeborg Vinther í Føroya Arbeiðarafelag**

VERKFALSRÆTTUR
*Áki Bertholdsen*

– Hetta er rætt og slætt óhugnalig tankagongd.

Nú Bjarni Djurholm ætlar at reisa spurningin um at tryggja, at aling og annað djórahald, ikki kunnu vera rakt av verkfallum framtíðini, skal hann ikki vænta sær hjálp frá fakfeløgunum. Landsstýrismaður í vinnumálum segði í Sosialinum í farnu viku, at hann fór at reisa spurningin um at gera eina lóg, sum tryggjaði, at tað í vissum skuldi bera til at friða aling og annað djórahald fyri verkføllum. Tað, hann hugsar um, er mest í sambandi við niðurberjing av sjúku ella aðrar neyðstøður.

Ingeborg Vinther, formaður í landsins størsta fakfelag, heldur, at tankagongdin er óhugnalig.

– Hetta er so ódemokratisk og fakfelag fíggindalig tankagongd, sum hugsast kann og hon brýtur við alla siðvenju á hesum øki, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at hetta er onki uttan ein roynd at skerja rættindini hjá fakfeløgunum at fara í verkfall.

– Hetta er eitt øki, sum politiski myndugleikin skal halda seg langt vekk frá, tí verkfalsrætturin er so grundleggjandi í samfelagnum, sum nakað kann vera.

– Hetta er tað bera diktatur. Hatta er fólkaflokspolitikkur, tá ið hann er best, sigur hon.

Men hon leggur afturat, at tað undrar hana ikki, at júst hetta kemur fram í hesi samgonguni.

– Tó vil eg fegin síggja restina av landsstýrinum og samgonguni taka undir vi hesum. Men tað hendir kanska, tí tað er ikki av ongum, at Arbeiðsgevarafelagið kunngerð í ársfrágreiðing síni, at tað tekur fult undir tí føra politikkinum og helst helst vil hava sama politikk førdan í framtíðini, sum higartil er førdur undir í hesi samgonguni.

Tað, sum hevur birt uppundir kjakið at friða djórahald og aling fyri verkføllum, er støðan sum tók seg upp á Funningsfirði í vár, har tað varð sagt, at verkfallið tarnaði arbeiðnum at berja sjúkuna niður.

– Hatta passar yvirhøvur ikki, sigur Ingeborg Vinther. Hon sigur, at 14 dagar eftir, at verkfallið var av, var framvegis ikki ein tann einasti sjúkur laksur í Funningsfirði, dripin. Støðan var ikki álvarsligari enn so.

Hon leggur afturat, at arbeiðsgevararnir vistu frammanundan, at bleiv verkfall, fóru ongi undantøk at verða givin. So teir valdu støðuna sjálvur.

– Tað skulu altíð tveir partar til at samráðast.

Hon leggur afturat, at skuldi sjúka tikið seg upp aðrastaðni, enn í einum alibrúki, eitt nú í einum fjósi, so er tað onki verkfall, sum forðar einum bónda í at skjóta eina kúgv, ella báðar tvær. Bøndur eru heldur ikki limir í fakfeløgunum.

### Har ein skriða......

Ingeborg Vinther ivast ikki í, at eydnast tað fyrst at lóggeva á økinum, so at okkurt øki verður friðað fyri verkfalli, verður tað bert byrjanin til fleiri øki.

– Tað verður ein skriða, sum fer á rull og verður fyrst eitt undantak gjørt, verður ikki leingi, so koma næstu undantøkini. So verður tað Landssjúkrahúsið, sum skal friðast, so ellis- og røktarheimini, so okkurt heilt fjórða, og so er at enda allur verkfalsrætturin so undirgravaður, at besta vápnið fyri betri korum heilt er tikið frá fakfeløgunum.


*Ingeborg Vinther sigur, at ætlanin hjá Bjarna Djurholm er at taka verkfalsrættin frá fakfeløgunum, men tað farta tey aldrin at góðtaka*



# Føroya Banki sera gott úrslit

**Hálvársroknskapurin hjá Føroya Banka fyri 1. hálvár í ár vísir eitt avlop fyri skatt áljóðandi 93 mió. Hetta er 8,6 % betri enn sama tíðarskeið í fjør. Góða úrslitið skyldast serliga øktum rentu- og kostnaðarinntøkum**

BÚSKAPUR
*Heri á Rógvi*

Eina góða viku eftir, at Føroya Sparikassi kunngjørdi teirra roknskap fyri 1. hálvár í ár, so var hin stóri føroyski peningastovnurin kláru við einum líknandi útspæli.

Eins og við Føroya Sparikassa, so vísir Føroya Banki eisini á sera góð úrslit. Sjálvur sigur Jørn Astrup Hansen, stjóri í Føroya Banka, at úrslitið hjá teimum er nógv betri enn tað hjá Føroya Sparikassa, tá hugsað verður um, at hava munandi størri vinning fyri hvørja kostnaðakrónu enn Føroya Sparikassi.

Tey hørðu tølini hjá Føroya Banka siga okkum so mikið, at tað gongur rættiliga væl hjá bankanum. Úrslitið gjørdist eitt avlop áljóðandi 93 mói áðrenn skatt. Ùrslitið eftir skatt var knappar 74 mío, og er hetta eitt lítið sindur minni enn sama tíðarskeið í fjør. Tað skal í hesum sambandi eisin viðmerkjast, at Føroya Banki í ár skal gjalda 19 mió í skatti, harafturímóti vórðu einans goldnar 10 mío fyri sama tíðarskeið í fjør. Orsøkin til hetta er, sambært Jørn Astrup Hansen, innviklaðu skattareglarnir, sum gera, at tað okkurt árið skal gjaldast munandi meira í skatti enn hini árini.

Av ørðum lyklatølum kann nevnast, at Føroya Banki fyri fyrstu ferð síðani 1995 kann vísa á ein góðan roknskap, har størtsti parturin av úrslitinum ikki stavar frá afturgoldnum burturleggingum. Hetta fegnast stjórin serliga yvir.

### Meira fyri hvørja krónu

Í roknskapinum fyri 1. hálvár í ár vísir bankin eisini á, at vinningurin fyri hvørja kostnaðarkrónu er 2,66. Hetta hevur Føroya Banki eisini valt at gera nógv burturúr. Vinningurin fyri hvørja kostnaðarkrónu vísir heilt einfalt til, at fyri hvørja útreiðslugoldna krónu fær 2,66 kr. aftur.

Sambært Jørn Astrup Hansen, so er tað á hesum økinum, at bankin stendur sterkari enn kappingarneytarnir yviri við Strond.

Úrslitið av vanliga rakstrinum hjá Føroya Banka var 92 áðrenn skatt. Tað, sum ger, at Føroya Banki vísir á eitt yvirskot áljóðandi 93 mió kr. er, at dótturfelagið Trygd eisini kundi vísa á eitt positivt úrsliti fyri fyrra hálvár í ár.

### Færri starvsfólk

Hóast flestu arbeiðsgevarar stríðast við øktar lønarútreiðslur, so kann Føroya Banki á hesum økinum borðreiða við einari smá lækking. Sambært Jørn Astrup Hansen, so skyldast hetta, at teir nú hava færri starvsfólk enn áður.

Samlaðu ognirnar hjá Føroya Banka eru eisini voksnar við prosentum til 5,2 mia. kr.

Jørn Astrup Hansen væntar at positiva gongdin hjá bankanum fer at halda fram restina av árinum.


*Úrslitið hjá Føroya Banka 1. hálvár í ár er 93 mió kr. í avlopi áðrenn skatt*

# Ferðavinnu verkstova

**Ferðavinnan í Føroyum savnast í dag til eina sonevnda verkstovu. Endamálið er at gera føroysku útbjóðararnar meiri sjónligar.**

FERÐAVINNA
*Heri á Rógvi*

Í dag (mikudagin) hava ymsu partarnir av føroysku ferðavinnuni sett hvørjum øðrum stevnu á Hotel Føroyum. Talan er um eina sokallaða verkstovu (Workshop). Luttakararnir vera 32 útbjóðarar og 6 ferðasmiðir. Útbjóðarar eru eitt nú gistingarhús og feløg, sum gera útferðir. Ferðasmiðirnir eru tey, ið seta hesar sokallaðu pakkaferðinar saman. Talan er um ein føroyskt verkstovu burturav.

Ætlanin er, at tær ymisku útbjóðararnir skulu kunna ganga runt il hesar ymisku ferðasmiðirnar. Endamálið er at gera útbjóðararn ar meiri sjónliga hjá ferðasmiðjunum, sigur Ferðaráð Føroya í tíðindaskrivi.

Hetta er fyrstu ferð, at ein tílík verkstovuverður i Føroyum. Sambært stjóranum á ferðaráðnum, Hera Niclasen, so er hetta tiltakið komið í lag eftir ynski frá vinnuni.

Hetta er samstundis fyrstu ferð at skipað verður fyri einari tílíkari føroyskari verkstovu. Verkstovan er løgd soleiðis, at hon er ein mánað áðrenn West Travel Mart, sum í ár verður í Grønlandi.

Tað verður Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, sum kemur at seta stevnuna. Eisini fer stjórin á Ferðaráðnum at siga nøkur orð.

Eftir ætlan endar tiltakið í dag kl. 17.30. Tiltakið er ikki alment.


*Á myndini formaðurin fyri Ferðaráð Føroya, Petur Olivar í Hoyvík, og stjórin á Ferðaráðnum, Heri Niclasen. Tað er Ferðaráð Føroya, sum skipar fyri verkstovuni.*

# Føroya Sparikassi vísir á góð tøl

Hetta er tíðin tá hálvársroknskapir byrja at koma fram. Føroya Sparikassi er heldur einki undantak í so máta. Úrslitið hjá Føroya Sparikassa fyri fyrra hálvár í ár var 29,9 rætta vegin eftir skatt. Úrslitið skyldast øktum rentuinntøkum og stóra kurstapið í fjør ikki heldur fram. Hóast hetta er vinningurin fyri hvørja kostnaðar munandi minni enn hjá Føroya Banka.

Í roknskapinum fyri 1. hálvár 2001 verður víst á, at úrslitið fyri 1. hálvár 2001 er 15,3 mío kr. betri enn úrslitið fyri 1. hálvár 2000.

Góða gongdin skyldast sjálvandi fyrst og fremst positivu gongdina í føroyska búskapinum. Flestu lántakararnir hjá Føroya Sparikassa eru fólk, sum lána pening til setthús o.a.

Øktu inntøkurnar skyldast eisini, at Føroya Sparikassi nú er farin at vinna meira pening burturúr ómaksgjøldum og øðrum gjøldum.

Útreiðslurnar til starvsfólk eru 1. hálvár í ár nakað tað sama sum 1. hálvár í fjør.

Hóast gjaldførið hjá Føroya Sparikassa er minkað frá 983 mío til 1,073 mia, so er samlaða gjaldføriå Sparikassans 25,9 %, og stuttfreistaða gjaldførið er 66,1 %.

Hóast Føroya Sparikassi 1. august lækkaði rentuna á inn- og útlánum, so væntar Sparikassin kortini, at ársúrslitið verður betri enn í 2000.

**-hr**


*Úrslitið av vanliga rakstrinum hjá Føroya Sparikassa var 38 mío áðrenn skatt.*